# Hugburðs-broyting

**John Zachariassen staðfesti eftir dystin, at bæði hann og liðfelagarnir nú hava ein væl sterkari sigursvilja, enn teir høvdu í grundspælinum**

HONDBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Einki er at siga til, at smílini á VÍF-leikarunum vóru stór, tá dysturin sunnudagin var lokin. Triðju ferð á rað høvdu teir bast Kyndli, men hesaferð var avrikið langt ífrá so sannførandi, sum tað var fýra dagar frammanundan.

Í øllum førum ikki fyrstu løtuna, tí í seinna hálvleiki vóru tað fyri tað vestmenningarnir, sum settu kósina, og tá hetta ikki bar til, megnaðu teir við reinari viljastyrki kortini at halda fast um dystin.

Eftir dystin fingu vit orðið á John Zachariassen, og hann ásannaði eisini, at tað hesaferð tók sína tíð, áðrenn teir komu ígongd.

– Ja. Vit megnaðu at venda øllum á í steðginum. Sjálvur helt eg eisini undan dystinum, at vit als ikki vóru eins uppsettir, sum vit vóru mikukvøldið, og tað sást eisini aftur í avrikinum. Í steðginum fekk Dia so staðfest, hvønn týdning dysturin hevði. At alt ikki var liðugt, bara tí vit høvdu vunnið eina hálvfinalu, men at hesin dysturin var altavgerandi fyri FM-møguleikan.

– Tað fekk okkum at rakna við, og samstundis haldi eg tað gjørdi góðan mun, at Johnny Joensen nú aftur er við. Hann gevur seg í øllum førum altíð 100%, og tað styðjar upp undir avrikið hjá okkum øðrum.

Seinastu minuttirnar tóktist alt hetta tó vera til fánýtis, tá Kyndil í drúgvari yvirtalsstøðu átti av avgjørt dystin. Sjálvur helt John tó, at teir alla tíðina trúðu upp á møguleikan. Eisini tá útlitini vóru alt annað enn góð.

– Har sá svart út, men vit hildu bara á fram at stríðast. Tað hevur nokk eisini havt sítt at siga, at vit júst hava vunnið á Kyndli tvær ferðir. Eg rokni í øllum førum við, at um hatta var hent fyri bara tveimum mánaðum síðani, so høvdu vit givið skarvin yvir.

Eingin ivi er um, at sigurin var týdningarmikil, men enn er langt eftir á mál hjá VÍF, og tað ásannaði John eisini.

– Treytirnar hjá okkum eru framvegis tær somu. Missur Kyndil einki, so skulu vit vinna allar okkara dystir, so tað verður á ongan hátt lætt. Men nú kunnu vit í øllum førum sjálvir avgera alt. Tað kundu vit ikki, um Kyndil hevði vunnið í dag, og tí var sigurin so sera umráðandi, staðfesti John Zachariassen at enda.



*– Eg rokni í øllum førum við, at um hatta var hent fyri bara tveimum mánaðum síðani, so høvdu vit givið skarvin yvir, helt John um drúgvu løtuna móti dystarenda, har Kyndi hevði bæði sett- og matchbólt*

VÍF-Kyndil 27

# Gylti møguleikin

**Við vyirtalsstøðu í fimm minuttir hevði Kyndil allar møguleikar at avgera dystin, men ístaðin snaraði VÍF dystinum - og FM-stríðnum - til egnan fyrimun seinastu løtuna**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




»Eitt tap í dag hevur við sær, at Kyndil uttan iva verða meistarar«

Somikið greið var áskoðanin í leikskránni hjá VÍF til dystin sunnudagin, og hetta var neyvan at taka munnin ov fullan. Sum støðan var undan dystinum, so skræddi vinnarin seg leysan av hinum, og vann Kyndil, so høvdu teir í góða málmuninum eitt eyka vápn, sum kann fáa heilt nógv at siga, tá talt verður saman eftir lokna kapping.

Men nú gjørdist setningurin sum so bara hypotetiskur, tí tað eydnaðist vestmenningum at basa Kyndli fyri triðju ferð innan knappar tríggjar vikur. Hesaferð í einum dysti, sum kanska var enn meira spennandi enn fyrra hálvfinalan teirra millum. Og undirhaldsvirðið sunnudagin kann næstan sammetast við tað, sum bæði liðini góvu áskoðarunum fyri knøppum ári síðani.

Tí talan var veruliga um undirhald til kræsnar gómar sunnudagin. Skiftandi yvirvág, spentar støður, taktisktar broytingar og ein bæði spennandi og dramatiskur endi. Spælið var kanska ikki av tí besta, sum bæði liðini hava sýnt í ár, men s*** verið við tí. Sum óvildigur eygleiðari var talan í øllum førum um besta dystin hetta seinasta knappa árið. Í øllum førum um ein »dystur« verður defineraður sum ein samanrenning av øllum tí, sum kann gera hondbólt til eina sera áskoðaravinarliga ítrótt.

### Skiftandi yvirvág

At VÍF hevði knógvað teimum grønu yvir tveir hálvfinaludystir fyri stuttum, tóktist frá fyrsta bríksli hava sína stóru ávirkan á, hvussu liðini fóru undir uppgávuna. Fyri bara tveimum mánaðum síðani mest sum rann Kyndil teir gulu niður frá fyrsta bríksli, men hesaferð gjørdu teir ikki somikið sum eina roynd í so máta. Allar helst var virðingin ov stór, til at hetta lat seg gera, og sjálvir tóktust vestmenningarnir eisini vera meira óimponeraðir hesaferð, enn teir so mangan áður hava verið.

Ikki minst gjørdi tað góðan mun fyri teirra viðkomandi, at Kyndils-verjan lág somikið fløt, at Sámal Joensen í fleiri førum slapp bæði ein og tveir metrar inn um teir tríggjar metrarnar, áðrenn hann setti av, og so kundi Kyndil akkurát tað sama givið stórskjúttanum tómt mál at skjóta eftir.

Spakuliga komu teir grønu tó fyri seg. Sjúkrafráveran av Jakob Jónsson tóktist ikki bila so nógv, nú Jónleif Sólsker veruliga hevði funnið aftur á slóðina í sínum spæli, og í so máta tóktist saknurin hjá VÍF í skadda Áka Olsen at vera munandi størri. Hetta setti í øllum førum stóra ábyrgd á Sámal og Inga sum avsluttarar, og tó at hesir royndu, so tóktist ábyrgdin í løtum vera ov tung at bera.

Og seinastu løtuna undan steðginum tóktist Kyndil vera liðið, sum í grundspælinum ongantíð leit aftur um bak. Verjan fekst upp at koyra, soleiðis at skjúttarnir vórðu støðugt órógvaðir. Í alopsspælinum fekst neyðugi friðurin yvir spælið, soleiðis at mistøkini gjørdust fá. Og fram um alt, so sýndu teir nú eisini neyðuga tolið, soleiðis at skotið ikki varð upp á hálvar og trýkvartar møguleikar. Kanska kundi munurin eisini verið enn størri, um ikki VÍF framdi